Undir leiðslu Paula Ellefsens:

Spæla teir Bør Børson við samfelagnum Føroyar

Undir páskoti av ringum tíðum verða tjóðveldismenn drignir eftir oyrunum í maktspæli sambandsfloksins, har teir undir leiðslu Paula Ellefsen bert hava eina uppgávu: at spæla Bør Børson við samfelagnum Føroyar skrivar Sverre Midjord í greinini

Tað, sum ein serliga hevur lagt merki til aftan á at vit fingu hesa samgonguna er, at Pauli Ellefsen ikki hevur broytt sitt gamla lag. Hann heldur framvegis fram við ti, at hann og flokkur hansara onga ábyrgd hava av ti, sum er farið fram og ti, sum nú hendir í samfelag okkara, «góða mamma, tað eri ikki eg».

Ein sera vánalig støða fyri ein politiskan leiðara og ein sera ring støða at arbeiða undir í einari samgongu.

Lesur tú greinirnar, sum hesin maður skrivar í Dimmalætting, so er tað ein áhaldandi útspilling av samgongufeløgum sínum, fólkaflokkinum og tjóðveldisflokkinum.

At hann leggur eftir Javnaðarflokkinum er einki nýtt, tí síðan Pauli bleiv leiðari av sambandsflokkinum, hevur hann av øllum alvi lagt sjógv imillum seg og okkara flokk, og hetta er væl skiljandi, tí tann politikkur, sum er framdur av sambandsflokkinum undir leiðslu Paula Ellefsens, er júst beint ímóti tí politikki, sum teir gomlu altismenn sambandsfloksins fórdu. Har var eitt orð eitt orð og ein maður ein maður.

Politikkur er ikki bara orð, men tær gerðir, sum verða framdar til gagns fyri okkara samfelag. Tað koma viðurskifti at taka seg upp, sum ikki altið verða gagnlig, men tað má ein viðurkenna, og ikki sum Pauli er serfrøðingur í, at skáka seg undan.

Tað er eingin loyna, at eg persónliga eri meira enn harmur um, at javnaðarflokkurin ikki er við í samgongu, tí tað er ikki bara til valini at standa fram og siga vilja fremja tiltøk, og so, tá valið er av, at skáka sær undan ábyrgd. Teir, sum bjóða seg fram, eiga at vita, at teir hava skyldu at taka við ábyrgd. Tí harmar tað meg, at okkara flokkur bar tað so í bandi, at júst henda samgongan bleiv ein veruleiki, og tí eiga vit okkara skyld av ti hørðu linju, sum serliga sambandsflokkurin førir, og sum hann sigur, væl letur seg gera, tí hinir flokkarnir blint akta harraboð. Tað tykist mær sum um koyrilin hjá Paula Ellefsen ikki nivur so fast sum koyrilin hjá Atla Dam.

Men tað er ikki so løgið, tí koyrilin hjá Atla Dam var vendur tann rætta vegin, har vart varð um vunnin rættindi, rættindi, sum nú sjálvt tjóðveldisflokkurin undir koyrlinum hjá Paula Ellefsen, er í ferð við at forkoma, og hetta er bara byrjanin. Undir páskoti av ringum tíðum verða teir drignir eftir oyrunum í maktspæli sambandsfloksins, har teir undir leiðslu Paula Ellefsens bert hava eina uppgávu, at spæla Bør Børsen við samfelagnum Føroyar.

Tí, hyggja vit at hvørjar ætlanir eru fyri framman, so má sigast, at serliga tjóðveldisflokkurin er farin langt út um tað, sum flokkurin annars segði seg standa fyri: Útseting av samhaldsføstu pensiónini, sum var løgd tilrættis av nevnd, sum teir áttu formannin í, arbeiðsrættur, sum bert hevur til uppgávu at jarðleggja tann rættin, sum arbeiðarafeløgini hava átt, avtøka av pristalsreguleringini.

— Jú, sanniliga eru kamelar slúktir og tjóðveldisflokkurin hevur sanniliga slúkt sín part við at fara í samgongu við ein flokk, sum krevur øll hesi mál fyri bert at eyðmýkja tann flokk, sum annars segði seg vera arbeiðaravinarligan, og so oman á hetta at fáa tað skotsmál, at tað eru tit í tjóðveldisflokkinum, sum ábyrgdina hava av øllum afturstigi í Føroyum.

Tað var Pilatus, sum á sínni vaskaði hendur sínar, hetta nýtist Pauli Ellefsen ikki. Hann válkar sær heldur í teimum ódygdum, sum hann, sambært blaðgreinum sínum, sigur at samgongufelagarnir hava.

Sannleikin, harra Pauli Ellefsen, er tann, at tú eins og allir teir, sum hava sitið við ábyrgd á Føroya Løgtingi, eisini eg og javnaðarflokkurin, mugu taka okkara part av ti, sum nú fer fram. Men tað, sum er skeivt er, at tey framvegis verða vard, sum áttu at borið ta størru byrðuna, og sjálvsagt uppá bekostning av teimum veikari stillaðu í samfelag okkara. Hetta er eisini okkara ábyrgd, tí at vit ikki fóru í samgongu og harvið stóðu á varðhaldi.

Tí tað er so rætt, sum Kristen Vestergård, valevni sambandsfloksins í Suðuroy, segði í grein sini í Dimmalætting í juni 1989. Einasta uppgáva, sum Pauli Ellefsen hevur, er at verja rentuspekulantarnar. Kristen Vestergård er ein av grasrótrunum í sambandsflokkinum, og tá ið røturnar gera so harðliga vart við seg sum her, tá eiga politiskir leiðarar at vanda sær um orð og gerðir. Tá er vandi á ferð, serliga fyri tann politikara, sum runnin er upp í slokk.

Pauli Ellefsen, tað er frá sínum egnu, ein skal hoyra sannleikan. Hann kann vera beiskur, men oftast er hann, sum í hesum fori, sera beinrakin.

Sverre Midjord

politisk viðmerking

Castro og Alia samdir:

Ongar broytingar á Kuba ella Albania

Ongar broytingar ella umskipanir kunnu væntast í kommunistisku stýrisskipanini á Kuba og Albania. Í nýggjársrøðu síni segði Fidel Castro, forsetin á Kuba, at tjóð hansara ongantíð fór at svikja marx-leninismuna og at allir politiskir og etiskir trupulleikar, sum fara at stinga seg upp, mugu loysast á kommunistiskum grundarlagi. Castro hevur sagt fleiri ferðir í seinastuni, at politisku kollveltingarnar í Eystur-Europa fara at skaða handilssambandið við Kuba. Kubanski búskapurin er neyvt knýttur at samhandli við Eystur-Europa og figgjarstuðuli úr teimum fyrrv. kommunistisku londunum. Castro rósti kubansku tjóðini fyri at vera trúgv ímóti kollveltingini í 1959, tá ið kapitalistiski einaræðisharrin Batista var rikin frá valdinum, og kommunistiski einaræðisharrin Castro kom í staðin.

Albania er eitt tað fátækasta landið í Europa. Tað hevur í nógv ár verið hermetiskt stongt kommunistiskt samfelag, og er nú eftir deyða Ceausescu seinasti skansin hjá stalinismuni í Europa. Ovastin í landinum, Ramiz Alia, segði í nýggjársrøðu sínari, at broytingarnar í Eystur-Europa onga sum helst ávirkan fóru at hava á politisku kósina í Albania. Albanska tíðindastovan ATA endurgav nýggjársrøðuna. Har sigur Alia m.a., at albanski kommunistaflokkurin altið hevur verið tann trúgvasti tænarin hjá albansku áhugamálunum. Alia ákærdi figgindarnar hjá Albania fyri eina haturskampanju móti Albania. Búskaparliga er Albania neyvt heft at Kina og N-Korea.

Sakarias

Stríddist fyri frælsi
av allari mátt.
Stríddist fyri frælsi
til síðsta andadrátt.

Tú ert farin
til síðsta hvíldarfrið.
tað koma aðrir
og taka við.

J. J. í Gerði